# Árligu fimleikaframsýningarnar hjá Havnar Fimleikafelag

TÍÐINDASKRIV

Framsýningin "Børn" verður leygardagin 12. mars kl. 14.00 og Framsýningin "Børn og Ung" verður kl. 17.00.

Framsýningin "Ung og Vaksin" verður mánadagin 14. mars kl. 19.00.

Allar framsýningarnar verða í Ítróttarhøllini á Hálsi.



### 3 framsýningar

Framsýningarnar eru býttar upp soleiðis, at framsýningin "Børn" rúmar aldurin 1 ár til 2. fl., meðan framsýningin "Børn og Ung", rúmar aldurin frá 2. fl. - 8 fl. Seinasta framsýningin "Ung og vaksin" rúmar 7.fl. og eldri.

### Innihalds- og hendingarríkt fimleikaár

Havnar Fimleikafelag hevur aftur í ár havt eitt innihaldsríkt fimleikaár. Felagið hevur í hesum fimleikaárinum runda tey 95 árini, vunnið Fimleikafagnaðin, Stórkappingarliðini Smágentur, Gentur og Kvinnur hava vunnið FM og Pinkurnar vunnu silvur.

Liðini hjá felagnum hava aftur í ár verið fullsett, og tiltøkini sum felagið hevur skipað fyri í vetur, so sum Familjudagur í gongugøtuni, Loppumarknaður, Rútmukapping, Amboðskapping, Føðingardag í SMS, hava verið væl vitjaði bæði av fimleikarum og áskoðarum.

### Í stuttum eitt hendingarríkt ár

FM í amboðsfimleiki, Summarfimleikurin, DM, International Rútmukapping og HM og fleiri tiltøk. Hóast árligu framsýningarnar verða nú, so er fimleikaárið langt frá liðugt, tí enn mangla FM kappingarnar í amboðsfimleiki, Smágenturnar skulu luttaka í DM, Genturnar skulu luttaka í Internationalari rútmukapping, Kvinnurnar skulu luttaka í HM. Spennandi verður at síggja hvussu leikur fer.

Felagið hevur í fleiri ár, havt summarfimleik fyri vaskin og í ár verður einki undantak. Nærri verður lýst í bløðunum seinni. Afturat hesum hevur felagið 2 tiltøk eftir at fyriskipa, t.e. stuðulsrenningin og tombola, og tá ið djóradagarnir verða úti í Havnardali í mei.

### Stuðlar

At enda ynskir felagið at nýta høvið, at takka øllum, sum á ein hvønn hátt hava stuðlað felagnum hetta fimleikaárið, uttan tykkara stuðul bar als ikki til at reka felagið, sum vit gera í dag. Tøkk til Føroya Banka, Tryggingarfelagið Føroyar, Farodane, Føroya Tele og Formula.fo.

Tøkk til Føroya Bjór, sum stuðlar Stuðulsrenningini og eisini ein tøkk til Damfar og MBM sum stuðla framsýningunum.

Takk fyri øll somul.

# Fisichella vann í Melbourne

Sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher koyrdi á - Nýggja liðið Red Bull racing eru nr. 3 í liðkappingini - Formel 1 koyringin í Melbourne boðar frá einum ómetaliga spennandi kappingarárið.



Vónirnar um veruligan spenning í formel 1 kappingini vuksu almikið náttina millum leygardagin og sunnudagin. Bert 17 sekund vóru ímillum teir fyrstu 5 bilarnar, sum umboðaðu 4 ymisk lið.

Fisichella var á odda alla koyringina, og var ongantíð veruliga hóttur av bilunum aftanfyri seg. Sigurin var sannførandi. Orsøkin til at bert seks sekund vóru niður til Barrichello á øðrum plássi, var ivaleyst tí Fisichella spardi motorin. Hann skal brúkast aftur í næstu koyring um tvær vikur.

### Regn er stuttligt

Longu í fyrstu tíðskoyringini var greitt, at koyringin fór at gerast spennandi. Miðskeiðis í tíðarkoyringini fór at regna. Umstøðurnar gjørdu at tíðirnar gjørdust øðiliga ymiskar. Hetta hevði eina rættuliga óvanliga byrjunarrøð við sær. 1. Fisichella (Renault), 2. Trulli (Toyota) og 3. Webber (Williams BMW). Vanligi oddafiskurin Michael Schumacher (Ferrari) fekk 18. byrjunarstøðu, og hin Ferrari bilurin við Rubens Barrichello skuldi byrja sum nr. 11.

### Schumacher rendi á

Sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher, gjørdi ikki nógv um seg. Hann er fyrr byrjaður aftast og hevur bart seg allan vegin upp í stuttliga endan av bilunum. Men hesafer lukkaðist tað ikki. Hann tyktist ikki so sannførandi og var beint uttanfyri stigini, tá hann rendi saman við Nick Heidfeld(Williams BMW). Ákoyringin sá rættuliga klossut út. Schumacher segði aftaná at hann ikki sá Heidfeld, sum royndi at yvirhála. Úrslitið var at báðir bilar brotnaðu 15 umfør áðrenn endan.

### Úr skugganum av Schumacher

Mundandi betur gekk hjá liðfelaganum hjá Schumacher: Brasiliumaðurin Rubens Barrichello, gjørdist ein av dagsins stóru hetjum. Hann megnaði at koyra frá 11. byrjunarstøðu til annað pláss. Við framúr taktikki, slap Barrichello framvið flestu kappingarneytunum í pittinum. Ungi spaniumaðurin Fernando Alonso (Renault) var bert 1,2 sekund aftanfyri Barrichello um mállinjuna.

### Reyðir tarvurin hevur etið Jaguarin

Fyrrverandi Jaguarliðið er selt til Eyturríska drykkið framleiðaran Red Bull. Okkurt heilt serligt man vera í Red Bull: Jaguar bilarnir, sum seinasta ár vóru heilt vónleyst ringir, eru nú nr. trý í liðkappingini. David Coulthard lá leingi nr. tvey, og var eitt sindur óheppin at bert gerast nr. fýra. Liðfelagin ungi Christian Klien sannførdi á sjeynda plássi. Red Bull hava ein góðan bil í ár.

### Endiliga kappingarførur

Tá veittra var við tí ternutta flagginum fyri Giancarlo Fisichella, var hetta bert annar sigur hjá 32 ára gamla italiumanninum. 2005 er tíggjunda ári í formel 1 hjá Fisichella. Endiliga sær tað út sum gávuríki koyrarin hevur fingið ein kappingarføran bil. Formel 1 fjepparar hava ongantíð yvast um gávurnar hjá honum. Men hann hevur satt at siga ongantíð havt ein vinnarabil. Hetta man fara at gerast eitt sera spennandi kappingarár.